## ORKA um allan heim

ORKA og Tutl hava fyri stuttum skrivað ein lisenseringssáttmála við franska plátufelagið Ici d'ailleurs fyri plátuna 'Livandi oyða'. Hetta merkir at 'Livandi oyða' næsta ár kemur út á Ici d'ailleurs í Frankaríki, Italia, Týskland, Grikkaland, Benelux, Japan og USA. Bæði Tutl og Ici d'ailleurs eru sera glaðir fyri samstarvið. Á heimasíðuni hjá Ici d'ailleurs ber til at keypa "Livandi oyða" í nýggjari útgávu, bæði á fløgu og vinyl. Eisini er møguligt at bíleggja ORKA t-blusur. .http://www.icidailleurs.com/artistes/orka_en.htm. Vinyl eintøk vera til keyps í Tutl handlinum í miðbýnum í Tórshavn stutt eftir jól, meðan t-blusur vera til sølu frá mánadegnum 22. desember.



# LÍV lækkar rentuna

**Eins og bankarnir hevur LÍV nú eisini gjørt av at lækka sína rentu. Hetta rakar tó bert kundar, sum eru komnir í skipanina aftan á ár 2000**

RENTULÆKKAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tryggingarfelagið LÍV hevur nú boðað frá, at tað lækkar rentuna frá 1. januar 2009 at rokna. Og tað verður talan um munandi lækking, úr 4,5% niður í 2,5%.

Í grundgevingunum fyri at lækka rentuna verður sagt, at støðan á fíggjarmarknaðinum hevur givið pensjónsfeløgunum stórar avbjóðingar, og ein avleiðing er ein lækkan av rentuni og ein fyribils hækkan av gjaldinum fyri flyting av tryggingarfelag.



*Tað fer at løna seg verri at vera kundi hjá LÍV, eins og tað verður dýrari at flyta til annað tryggingarfelag*

Meginparturin av árinum hevur verið merktur av alheims fíggjarkreppuni, sum hevur ført við sær eitt munandi fall á virðisbrøvunum. Patrabrævakursirnir eru falnir ógvuliga nóg, millum 30% og 50%, og hetta hevur við sær, at LÍV fær eitt negativt íløguavkast fyri 2008. Flestu tryggingarfeløg hava lækkað rentuna og nú hevur LÍV so eisini gjørt av at lækka sína rentu niður í 2,5%.

Tó verður ikki skorið yvir ein kamb. LÍV hevur tvey sløg av tryggingartakarum, teir, ið hava teknað sína trygging undan ár 2000, og teir, ið hava teknað hana eftir ár 2000.

Tey, sum hava teknað trygging undan ár 2000 hava eina grundrentu upp á 4,5% við landskassaveðhaldi, og tað fara tey framhaldandi at hava eftir 1. januar 2009. Men tey, sum hava teknað tryggingina eftir ár 2000 verða skorin niður í 2,5% í grundrentu.

Bonusafturbering av váða- og umsitingargjøldum verður óbroytt í 2009, tó verður ikki útlutað rentubonus ella renta av hesum, sigur LÍV.

### Dýrari at flyta

Ein onnur avleiðing av fíggjarkreppuni er, at LÍV hevur gjørt av at hækka kostnaðin fyri at flyta tryggingarfelag. Hetta er eisini galdandi fyri tryggingartakarar, sum ynskja at afturkeypa sína trygging í úrtíð.

Hetta verður gjørt, sigur LÍV, fyri at tryggja, at kundar hjá LÍV ikki skulu rinda fyri kundar, sum velja at flyta. Gjaldið verður fyribils ásett til 5% av uppsparda virðinum á tryggingini, men gjaldið verður tó sett niður aftur, tá støðan á fíggjarmarknaðinum batnar.

LÍV ger vart við, at hetta onga ávirkan fær fyri flestu kundarnar.

- Kundar, ið lata pengarnar verða verandi hjá LÍV, merkja einki til hetta, eins og tað onga ávirkan fær fyri pensjónistar, sum fáa útgjald frá LÍV ella skjótt fara at fáa útgjald, sigur LÍV at enda í tíðindaskrivi.

# Faroe Petroleum trý nýggj loyvi

**Faroe Petroleum hevur fingið handað trý norsk leitiloyvi í sambandi við 2008 APA útbjóðingarumfarið. Ongar treytir eru í verkætlanunum um at borast skal á loyvunum**

LEITILOYVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Loyvini, sum felagið hevur fingið, eru:

PL475 BS, sum liggur á Halten økinum. Faroe Petroleum hevur 30% av loyvinum. Loyvið fevnir um eitt øki uppá 38 km2, og er framhald av loyvi PL475 Santana, har felagið hevur bundið seg til at bora ein brunn í 2010. Hini feløgini, sum luttaka í boringini, eru Revus Energy, ið er fyristøðufelag, Conce-do og Centrica.

PL510, sum eisini liggur á Halten økinum. Faroe Petroleum hevur 20% av hesum loyvinum. Loyvið fevnir um eitt økið uppá 298 km2. Fleiri leitimið eru á loyvinum, ið liggur nær við øðrum loyvum, sum felagið frammanundan hevur. Centrica er fyristøðufelag, og hini feløgini, sum luttaka, eru E.ON Ruhrgas og North Energy.

PL507, sum liggur í norðara parti av Norðsjónum. Faroe Petroleum hevur 30% av hesum loyvi. Loyvið fevnir um eitt økið uppá 973 km2, og liggur beint við eitt loyvi hjá Faroe Petroleum, sum nevnist Kalvklumpen. Mett verður at tað er góður møguleiki fyri at finna kolvetni á loyvinum. Revus Energy er fyristøðufelag, og hini feløgini, sum luttaka, eru Spring Energy og Centrica.

### Lagalig fígging

Verkætlanirnar fyri øll loyvini fevna fyri tað mesta um viðgerð av seismikki, og úrslitið av hesum kanningum verða við til at avgerða, um feløgini fara at bora brunnar á loyvunum.

Stórir fyrimunir eru við at leita eftir kolvetni í Noregi, tí tað fæst sera lagalig fígging, av tí at norski staturin endurrindar 78% av øllum útreiðslum í sambandi við leiting eftir kolvetni á norskum øki.

Faroe Petroleum heldur fram við síni boriverkætlan komandi tvey árini, sum øll er fíggjað. Komandi 3 mánaðarnar luttekur felagið í einum metingarbrunni og tveimum leitibrunnum í Noregi.

Tíðindaskriv á enskum er á heimasíðu felagsins www.fp.fo



*Niels Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni, fegnast um nýggju loyvini hjá felagnum*